# Høgni Lisberg og Eivør gera um seg í Íslandi

**Høgni Lisberg og Eivør hava løg á íslendsku savns-fløguni 100% Sumar, sum í løtuni er millum best seldu fløgur í Íslandi**

TÓNLEIKUR
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Fløgan 100 % Sumar liggur hesa vikuna á fjórða plássi á íslendska sølulistanum. Á fløguni, ið kom út herfyri, eru best umtóktu løgini í Íslandi í summar, umframt øll íslendsku nøvnini eru Eivør og Høgni Lisberg eisini á fløguni.

Eivør er umboða á fløg-uni við lagnum Nú ertu 3ja ára, sum hon syngur saman við íslendska symfoniorkestinum, meðan Høgni Lisberg hevur fingið lagið Morning Dew á fløguna.

Um tað mundið tá Atlantic Music Event var í Reykjavík, var lagið Morning Dew hjá Høgna Lisberg millum mest spældu løg í íslendskum útvarpi, síðan hevur eisini lagið Learn To Ride On Waves gjørt um seg, men nú Morning Dew er á fløguni 100 % Sumar eru útvarpsstøðirnar aftur farnar at spæla Morning Dew.

Føroyavinurin Jens Guð sigur við Sosialin, at Høgni Lisberg hevur fingið støði sum eitt veruliga stórt navn í Íslandi.

– Eivør og Týr eru ivaleyst enn størstu føroysku nøvnini í Íslandi, men Høgni liggur á einum greiðum triðja plássi, sigur Jens Guð. Fløgan hjá Høgna Lisberg varð á Planet Awards vald til bestu føroysku útgávuna í 2005, og bæði í Miðevropa og í Íslandi hevur popp/rokkurin vakt ans.



*Høgni Lisberg spældi tvær konsertir í Reykjavík í sambandi við AME Reykjavík*
*mynd: Niels Uni Dam*

inni - trygt og ómaksleyst til hús



**Tvíhús - Áargeil 13B, Tórshavn**
Húsini eru í 3 hæddum. Grundøkið er 283 fermetrar. Byggiár: 1986. Í niðastu hædd, sum er 39 fermetrar er durur, baðirúm, køkur, stova, kamar umframt vaskirúm, kjallararúm og fýrrúm á 15 fermetrum. Í miðhæddini, sum er 44 fermetrar, er køkur, stova, kamar og baðirú umframt stór inngongd. Í ovastu hædd, sum er 48 fermetrar, er køkur, stova, kamar og baðirúm. Húsini verða seld, um hóskandi boð fæst.



**Tvíhús - Skørugøta 5, Tórshavn**
Húsini eru í 2 hæddum, hvør 67 fermetrar, í alt 134 fermetrar - alt innrættað. Grundøkið er 348 fermetrar. Byggiár: 1982. Í ovaru hædd er køkur, stova, hjúnarrúm, wc, altan og gongd. Gott pláss er á ovasta lofti, sum kann innrættast. Í niðaru hædd er durur, stór gongd, bryggers, 2 stór kømur og stórt baðirúm við klæðnarúmi. Nýtt stórt bilhús á uml. 30 fermetrar er framman fyri húsini. Húsini standa við blindan veg í friðarligum, barnavinarligum umhvørvi og hava sera gott útsýni. Prísuppskot: kr. 1.800.000,00.



**Sethús - Hvalvíksvegur 69, Hvalvík**
Húsini, sum upprunaliga eru bygd í 1920'unum og høvuðsumvæld 2001-2005, eru í 3 hæddum. Alt er grivið upp og steinsett av nýggjum, og allar innleggingar eru nýggjar. Niðasta hædd og miðhædd umleið eru 45 fermetrar og ovasta hædd er umleið 30 fermetrar - í alt um 120 fermetrar búøki. Grundøkið er 270 fermetrar. Á loftinum eru 2 kømur, baðirúm og alrúm. Í miðhæddini er inngongd, durur við hita í gólvinum, gongd, køkur, kovi og 2 stovur. Í niðastu hædd er nýtt baðirúm við gosbað og kjallararúm. Omanfyri húsini er hjallur á 8 fermetrar og fjós á 15 fermetrar. Húsini standa væl fyri mitt í bygdini nær við skúla og barnagarð. Húsini verða seld, um hóskandi boð fæst.

P/F inni • Niels Finsens Gøta 37
P.O. Box 364 • FO-110 Tórshavn
inni@inni.fo • Tlf. 35 42 00 • Fax 35 42 01
inni

## Villmaður í nýggjum bólki

Tað verður eingin minni enn villmaðurin Holgar, ið stendur á odda fyri bólkinum, ið fer á pallin í Glitni hetta vikuskiftið, og tað skuldi borga fyri eini heilt serligari uppliving.

Holgar hevur umframt villmannatilveruna kontribólkin Dimmi, ið spælir vælsvingandi kontrislagarar.

Fríggjakvøldið letur Glitnir gestir sínar fáa høvið at hita pallin upp til kontribrakið leygarkvøldið, tá Karaoke kvøld verður. Sambært fyriríeikarunum hava viðskiftafólkini í Glitni veruliga tikið karaoke kvøldini til sín.

**nud**

## Showmenn aftur í Havn

Showmenn skrivaðu her fyri sáttmála við Cippo, og hetta sæst hetta vikuskiftið aftur í skránni hjá dansistaðnum í Tórsgøtu.

Júst aftur komnir til Havnar eftir konsertir saman við Kim Hansen, F.R. David og Maggie Reilley umframt sum Showmenn í teltinum, fara Kim, Jens Marni; James og Jóhannes at spæla í Cippo í fríggjakvøld og leygarkvøld.

**nud**

Vitja heimasíðu okkara á www.midvagur.fo

Miðvágs Kommuna









Forsíða » Kommunan » Kommunustýrið » Borgarin » Trivnaður » Barnaansing » Vinnan » Mentan »